# Hvat eyðkennir atburðin hjá fólki í krepputíðum?

**Tómleikans fylla í fyltari vælveru**
**Menniskjan eins og hønur, ið verða fóðraðar**
**Kreppan sum væleydnað skurðviðgerð í sálini**
**Kreppan, álvaratos í álvara og gaman**




*Jógvan Fríðriksson, bispur, helt fyrilestur á Ársins leiðaradegi fyrr í ár*
*Mynd: Gissur Patursson*

*Røða, Jógvan Fríðriksson, biskupur, helt á Ársins Leiðaradegi*

Fólk flest liva lívið í einari javnvág, ið fáur gevur gætur. Tað eru tilverunnar kor og endurtøkur lívsins, ið skapa eina vanahugsan. Soleiðis hava vit gjørt, og soleiðis verður frameftir. Tilveran eggjar til vanahugsan, tí hvør dagur byrjar um morgunin og endar um kvøldið. Ímillum morgun og kvøld renna vit aftan á klokkuni, og soleiðis sæð er eingin stórvegis broyting.

Ístaðin fyri at hugsa og taka eina sjálvstøðuga avgerð, renna vit øll við streyminum, og við streyminum er altíð viðrák, so leingi sjóvarfallið liggur. So eru kyrrindi, ið vit við búskaparligum brillum kunnu kalla Time Out. Og so brádliga rekur ímóti, og vit hava mótrák, ið vit kalla kreppa.

Sjómaðurin veit, at sjóvarfallið liggur seks tímar. Hin skriftkøni veit, at talan er um sjey feit og sjey rak ár. Øll heimssøgan prógvar enntá fleiri ferðir í 20. øld, at búskapar og samfelagsviðurskiftini broytast. Viðhvørt kemur umskifti eftir eini nátt.

Havandi hesa vitan í huga, eigur kreppan ikki at koma so óvart á nakran. Skilagott er at lesa lívsmynstur teirra gomlu, og tey gomlu søgdu, at hetta er gott at goyma til verri tíðir. Vit, ið eru so yvir upplýst og liva í einum samfelag við høgari vitan og framkomnum tøkni. Í einum samskiftis og vitanarsamfelag við lærdómi og vísind kemur kreppan óvæntað.

Tað er ein løgin kensla, at tann lærda vitanin ikki veit tað, ið tann ólærda vísindin visti av handahógv og lívsroyndum. Við at kenna søguna og vera tilvitaður um nútíðina kunnu vit gera metingar um framtíðina.

## Tómleikans fylla í fyltari vælveru

Atburður fólksins í góðum og vánaligum tíðin líkist sær sjálvum. Vit fylgja við. Nøkur eru fremri enn vit í møguleikum, men vit vilja øll frameftir, tí tað at standa í stað er eitt afturstig.

Eisini búskaparliga góðar tíðir reka menniskju út í eina kreppu. Talan er um eina menniskjansliga kreppu, tað at vit hava torført at fóta okkum í øllum meldri av møguleikum. Tann menniskjansliga kreppan kann føra til eina sosiala og búskaparliga kreppu fyri hin einstaka og tey avvarðandi. Ein slík kreppa verður í góðum tíðum avroknað og goldin av samfelagnum, tí almenna húsarhaldinum.

Í ringum tíðum er kreppan so mikið størri, hóast mynstri er broytt. Nú byrjar kreppan við búskaparligari niðurgongd, ið síðani førir til eina persónliga kreppu vegna uppsøgn, arbeiðsloysi og væntandi tøkan pening. Tann persónliga kreppan elvir til eina menniskjansliga og sosiala kreppu, sum tað almenna vegna kreppuna ikki megnar at avrokna og gjalda. Og so er kreppan fullkomin.

Lívið er ikki einfalt, og tað er torført at greina tilverunnar kor til lítar. Men, nakað bendir á, at vit ikki veruliga skilja, at vit viðhvørt renna til onga nyttu. Renna undan lívinum eftir nøkrum, ið kann gjalda prísin fyri tað, ið vit missa, meðan vit renna fyri lívinum. Tómleikans fylla í fylltari vælveru.

## Menniskjan einsog hønur, ið verða fóðraðar

Torført er at lýsa støðuna í myndum, tí myndirnar er avlagandi. Vit mega hava virðing fyri hinum einstaka menniskjanum og virðing fyri samfelagnum.

Ein kendur føroyingur lýsti einaferð ta andaliga landslagið í Føroyum soleiðis : " Vit eru sum ein flokkur av hønum, ið verður fóðraður. Kastar húsbóndin ein nevna av korni til vinstru, ja so eru allar hønurnar har. Kastar húsbóndin ein neva av korni til høgru, so eru hønurnar har. Menniskjan, vit eru sum hønurnar. Ístaðin fyri at eta í friði og náðum, so er altíð betri aðrastaðni. Vit renna ímillum, og renna okkum um koll.

Eisini tímiliga hendir tað sama. Øll vilja eta úr somu krubbu. Gongst einum væl, so vilja vit hava lut í ágóðunum. Og tá krubban er tóm býtast hestarnir, sjálvt um teir mangan áður hava runnið um kapp sama teini í sátt og semju.

## Kreppan sum væleydnað skurðviðgerð í sálini

Kreppan sigur í roynd og veru ikki annað enn tað, vit øll vistu fór at henda. Vit vistu bara ikki nær, og hvussu stór niðurgongdin fór at vera, um kreppan var lítil ella ovurstór og svár.

Tað minnir um sjúklingin, ið væl visti um sjúkuna, men ikki gav sær stundir at fara til læknan, fyrr enn likamið ikki orkaði meira. Neyðin lærir nakna kvinnu at spinna.

Kreppan er svár og torfør, og talan er um ein dýran prís at gjalda hjá øllum. Svárast er støða teirra, ið arbeiðsleys og ikki hava sámiligt gjaldføri.

Um tað er nakað jaligt við kreppuni, so kann tað vera, at vit hugsa øðrvísi um lívið enn áður. Eru onnur virðir til? Ella skulu vit í framtíðini gera størri íløgur í sjálvt lívið, - trivnaðin, familjuna, børnini og tey gomlu. At gera eina íløgu í sjálvt lívið er eitt lívsverk.

Vit hava sæð, at tilveruni tørvar fleiri bein at standa á. Eitt av teimum er búskapur og fíggjing. Eittannað bein at standa á, ið annars avmarkar kreppuna, eru lívsvirði, - tað at geva sálini gætur.

Kreppan, álvaratos í álvara og gaman

Kreppan broytir menniskju, avlagar lívsmynstrið og rekur eina fjøld av fólki út í ráðaloysið. Hugburðurin til sjálva tilveruna broytist. Og hvørja ferð eitt menniskja missir móti ella lívsviljan, er kreppan orsøk til stóran skaða.

Sjálvt um kreppan er ein heimskreppa, so er tað eingin undanførin hjá okkum í Føroyum. Eru vit heimsborgara, so hava vit okkara ábyrgd av kreppuni. Um ikki, so spæla vit fólk í húsi. Eyðvitað hava okkara ábyrgd, sjálvt um hon í vavi er avmarkað.

Tað er ein kreppa við síðuna av kreppuni. Tann stóra kreppan er fylgjan av tí fíggjarligu kreppuni. Vit plaga at hoyra læknar tosa um sjúkuna, at hon er torfør at lekja, men vit kunnu lekja symptomini.

Eisini kreppan hevur síni eyðkenni, og eyðkennini eru ein mental kreppa. Máttloysi, vónloysi og ein svartur dagur. Henda kreppan er sjálv kreppan. Tann mentala kreppan ger fíggjarkreppuna enn størri, tí torført er at bróta upp um armar í máttloysi.

Vit mega ikki falla í fátt, tí eisini hesa kreppuna fara vit at klára. Men prísurin er høgur. Meðan vit arbeiða okkum uppundan, eiga vit at rigga okkum til, so vit um eini fimtan / tjúgu ár er før fyri at taka ímóti tí næstu fíggjarkreppuni. Og hon kemur, so satt søgan endurtekur seg.

Tað var trettanda kvøld, og vit hugnaðu okkum óført. Pápi var glaður og vælnøgdur, hann frøddist um, at tað gekk ímóti ljósari tíðum. Sólin kom hægri á luftina og dagurin longdist. Vár var fyri framman, og so kom summarið.

Tá letur í abba, ið dapur í ásjón og álvarsliga segði við sonin : " Sonur mín, Frederik, gleð teg ikki for tíðliga. Tað myrknar skjótt aftur."